# Avmarkaður politiskur kapasitetur

SJÓNARMIÐ
*Hermann Oskarsson*



Fult skip hendan túrin. Soleiðis kundi man sagt um, hvussu árið í fjør hilnaðist føroyska búskapinum. Og sama skilið verður væntandi hendan túrin í 2007. Skipið er borðfult, og hvør krubba er full. Manningin brýtur vakt, og sjálvt kokkurin er á dekkinum. Tá skipið er fult, plaga øll at vera glað. Og tað eiga vit eisini at vera, tí arbeiði er til allar hendur, og inntøkurnar eru so frægar, tær fáa verið - sum standurin á skipinum er.

Men skipið, Føroyar, er ikki í besta standi. . . og nú fari eg at sleppa mær burtur úr hesum líknilsinum, áðrenn eg fari at vrøvla um maskinu, spøl og aðra útgerð umborð, tí samanburðir røkka bara eitt vist.

**At markinum**
Orðadráttur hevur tikið seg upp, um vit hava ovurhitaðan búskap, ella vit ikki hava. At keglast um "ovurhitaður" er rætta heitið, er av fleiri grundum ein fruktaleys diskusjón. Vit hava ongan normalan kroppshita at meta eftir, tá talan er um búskap, so at kjakast hvørt hitin er ov nógvur ella ikki, ber ongantíð á mál. Og fepurstokk hava vit ongan, tí vit hava ikki hagtøl um lønarlagið.

Men vit kunnu í minsta lagi sláa fast, at vit eru komin at kapasitetsmarkinum, tí fleiri fólk fáast ikki til arbeiðis, so sum støðan er. Vit, sum búgva her, hava øll arbeiði, sum tíma og orka. Og fleiri tykjast vit heldur ikki at blíva, tí heimflytingin er uppsteðgað, og møguleikarnir hjá útlendingum at koma hendan vegin, eru smáir.

Bløðini eru full av starvslýsingum - men tá eitt starv verður sett, verður ein annar sessur tómur. Hetta skilið gevur hugaðum og hegnigum fólkum høvi til at sleppa sær í størv, tey heldur ynskja sær, og kanska fyri eina betri løn enn frammanundan.

Men framleiðslan gerst kortini ikki størri av, at fólk skifta arbeiði - tænasturnar verða ikki fleiri til keyps, fleiri hús verða ikki bygd, og meira verður ikki virkað av fiski. Vit eru tí komin at markinum fyri, hvussu nógv vit fáa virkað av vørum og tænastum til at selja – við verandi tøkni, væl at merkja. Og við galdandi samfelagsbygnaði.

Tøknin broytist ikki eftir einum ári, so tí kunnu vit ikki vænta, at hvørt arbeiðspláss á flakavirkinum fer at virka meira fisk næsta ár, ella at bankarnir kunnu veita somu tænastuna við færri fólkum næsta ár.

Men hvat so við samfelagsbygnaðinum? Hvat við teimum lógum og reglum, sum stýra hvussu hvør skal bera seg at í vinnu og arbeiði?

**Politiskt kapasitetsmark**
Tað mest avgerandi fyri búskaparligu framgongdina í einum landi, er ikki um arbeiðsloysið er fimm ella tvey prosent. Tað mest avgerandi er, at galdandi lógir og reglur fyri vinnuligt virksemi gagna framburði og menning, og at tær ikki halda landinum føstum í gomlum stirvnum skipanum.

Politisku fráboðanirnar í sambandi við komandi fíggjarlóg tykjast benda á, at vit ikki bara eru komin at vinnuliga kapasitetsmarkinum, men at eitt politiskt kapasitetsmark nú dagar undan.

Við einum Pavlovskum reflexi boðar Landsstýrið frá, at nú búskapurin er í vanda fyri ovurhiting, skal fíggjarlógin næsta ár skerjast við nøkrum hundrað miljónum. Hvat samband ið er millum hendan ovurhitan og 200 miljónir á fíggjarlógini, geva landsstýrismenn sær lítið far um. Men teir eru ivaleysir í, at nú fer tað at síggja út, sum gera teir okkurt við málið.

Hendan samtyktin í Landsstýrinum var ein meirilutaavgjørd neyðsemja, eftir at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevði skotið upp, at taka tey bæði stigini – at taka skattafrádráttin hjá sjómonnum av og at bíða við at seta á undirsjóvartunnilin til Sandoynna.

Man kann siga, at tað eru tveir mátar at møta hesum búskaparliga kapasitetsprobleminum. Annar er tann vanligi – at skerja landsins fíggjarlóg í blindum, uttan at tað hevur nakra gagnliga ávirkan yvirhøvur. Hin er at brúka løtuna til at rúmka tann bygnaðarliga karmin um vinnulívið í landinum, so at kapasiteturin økist gjøgnum smidligari tillaging til marknaðarkor. At lata reiðararnar gjalda fyri fiskiloyvini og at lætta um møguleikarnar hjá útlendingum at koma til arbeiðis her heima, høvdu verið líka gagnlig tiltøk sum at avtaka skattafrádráttin hjá sjómonnum.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum skjeyt upp tvey tiltøk, sum nettupp ikki eru panisk krepputiltøk. Eitt tiltak – avtøka av serliga skattafrádráttinum hjá sjómonnum - sum samstundis pjøssar nakað upp á sjálvan vinnuliga bygnaðin - og so at útseta eina risaíløgu. Tvey tiltøk, sum nettupp ikki eru at spæla fíggjarpolitiska neyvstýring, men sum virka bæði tálmandi og rúmkandi.

Men her rakti hann politiska kapasitetsmarkið í føroysku smáparlamentarismuni. Gomlu vinirnir í føroyskum politikki samdust skjótt um uppskriftina, sum bjargar teimum sessirnar eftir næsta val.



Lesið Sosialin -so eru tit við!

## Rætting

Í blaðnum hósdagin skrivaðu vit um bátin, sum Trygd vann á ólavsøku, at tað var Lions sum lutaði bátin burtur. Hetta var ikki rætt. Tað var Kiwanis, sum lutaði burtur bátin. Orsakið mistakið.

**blaðstj.**

# Ørt og óforsvarligt – at steðga við útbyggingini av Vága Floghavn

HEIDI PETERSEN
løgtingskvinna



1800 metrar í Vágum og nýggjan altjóða flogvøll í Føroyum.

Í sambandi við at Poul Michelsen mælir til at steðga útbyggingini av flogvøllinum í Vágum vil eg gera vart við, at eg haldi tað vera púrasta ørt og óforsvarligt ikki at útbyggja og nýmótansgera Vága Floghavn.

Flogvøllurin og umstøðurnar hjá ferðafólki eru á ongan hátt nøktandi til tann tørv vit hava í Føroyum í dag. Sum øll onnur donsk málsøki í Føroyum er flogvøllurin forsømdur av grovasta slag, afturúrsigldur í allar mátar, ikki útbygdur, ikki dagførdur við nýggjastu tøkni og umstøðurnar til ferðafólk als ikki nøktandi.

Tað er at fegnast um, at vit endiliga hava fingið fulla ábyrgd av flogvøllinum og hava samtykt, at nú skal veruliga nakað munagott gerast í Vágum. Mælti sjálv til at útbyggja flogvøllin til 1800 metrar, havi vón um, at tað kann koma upp í verkætlanina, sum nú fer í gongd, har man bert byggir út til 1500 metrar.

Tað einasta rætta er síðani at skapa samstarv um at byggja ein nýggjan altjóða flogvøll á alternativum stað í Føroyum. Hetta samstarv eigur landið at taka stig til og fáa kommunur og privat feløg at luttaka í. Vit skulu burtur frá tosinum at altjóða flogvøllurin skal liggja í Havn, Søltuvík ella Skorðhæddini, einasta treyt og krav eigur at vera, **hvar liggur flogvøllurin best sum alternativ til Vágar,** altso hvar eru umstøður, altso hvar ber til landafrøðiliga at leggja ein vøll, og hvar eru veðurlíkindi beint tað øvugta av í Vágum, alt annað er óneyðugt uttanumtos og kemur bert at leingja um tíðina til vit fáa ein altjóða vøll.